## Liverpool vil hava Villa

Sambært Sunday People fyrireikar enska Liverpool í løtuni eitt boð upp á spanska David Villa, sum spælir í Valencia, men sum á landsliðnum er liðfelagi við Fernando Torres. Valencia hevur verið í fíggjarligum brotasjógvi seinasta árið, men kortini hevur felagið støðugt sagt nei til at selja Villa. Nú sigst Liverpool vera til reiðar at rinda 365 milliónir krónur fyri áleyparan, sum í fjør skeyt heili 28 mál í Primera Division, umframt at hann eisini var toppskjútti í EM-endaspælinum.



## Tevez søkti West Ham

Carlos Tevez var stóra hetjan, tá Manchester City í gjár vann 3-1 á West Ham í ensku Premier League. Tevez skoraði til 1-0, áðrenn Carlton Cole javnaði fyri West Ham. Martin Petrov, sum annars hevur verið úti við skaða, legði City á odda 2-1 við beinleiðis frísparki, og á tímanum punkteraði Tevez spenningin, tá hann stútaði bóltin í netið til 3-1. Við sigrinum hevur Manchester City 15 stig fyri fyrstu seks dystirnar, og er liðið trý stig aftan fyri oddaliðini úr Chelsea og Manchester United.



© Terji S. Johansen

## Ása ætlar eisini at vinna 10 ferðir

Ása K. Thomsen, sum skoraði trý av teimum fýra málunum hjá KÍ, var ein hin største upplivingin í dystinum á Argjum í gjárkvøldið. Støðugt søkti hon at og var ein hóttan, og tað sá ikki út til at vera av tilvild, at hon dugdi at vera á rætta staðnum til rætta tíð tær tríggjar ferðirnar.

– Ja, hetta var ein alvorliga góður dystir fyri mítt viðkomandi, tí tað er ikki á hvørjum degi, eg fái trý mál. Men eg kom at standa væl fyri, og tað vóru líka so nógv hinar, sum gjørdu tað. Men tað var super, segði trífaldi málskjúttin, ið hevði væntað ein javnari dyst.

– Vit høvdu slett ikki væntað, at sigurin fór at gerast so sannførandi, sjálvt um vit í øllum førum høvdu ætlað okkum at vunnið. Vit roknaðu við, at tað fór at verða rættiliga javnt, men ætlaðu okkum at vera betra liðið, og tað vóru vit eisini. Betra liðið vann.

Ása, sum er ein av yngru spælarunum á liðnum, har fleiri hava verið við til at vunnið allar 10 ferðirnar, sum KÍ nú á rað er blivið meistari, ætlar sær at røkka líka langt sum tær eldru:

– Eg eri rættiliga stolt av at vera meistari og at vera á liði saman við fleiri av teimum, sum hava vunnið øll 10 árini. Men tá tær gevast, so ætli eg mær eisini at verða ein, sum hevur vunnið 10 ferðir, áðrenn eg gevist, segði hon.

**hil**

søkti fram, rakk tað ikki til meira enn hálvar hóttanir, og ferð eftir ferð vísti tað seg, at Randi Wardum í KÍ-málinum dugdi at lesa av, hvat fór at henda, og tí gjørdist tað ongantíð vandamikið.

Fimm minuttir fyri steðgin valdi AB so at satsa og setti ein framherja aftrat inn, men hetta hjálpti lítið, tí minuttin eftir økti KÍ til 3-0. Rannvá Andreasen, sum hevði lagt upp til tey bæði fyrru málini, varð málskjútti hesa ferð, tá hon við einum góðum skoti frá brotsteigarmarkinum setti bóltin í málið. Alt hetta, hóast hon í útgangsstøðinum spældi á vinstra bakki!

Seinni hálvleikur var heldur ikki meira enn átta minuttir gamal, so var 4-0. Hesa ferð var tað Vivian Bjartalíð, sum fór ígjøgnum í vinstru síðu og legði høgt innfyri. Simona Heinesen í AB-málinum fekk ongantíð fatur í bóltinum, sum datt niður fyri føturnar á Ásu, ið heilt inni fyri málinum kundi staðfesta sítt »hat-trick« og sannførandi KÍ-sigurin – fyri ikki um at tala meistaraheitið.

Einasti veruligi málkjansurin hjá AB, ið tó skal hava rós fyri at stríðast og arbeiða allan dystin á tamba, var eitt skot frá Monu Breckmann, ið endaði á yvirliggjaranum. Meira gjørdist tað ikki til, og hóast vónbrotið lýsti av AB-kvinnunum eftir dystin, eiga tær stóran heiður av hesum kappingarárinum, sum við steypasigrinum og landskappingarsilvurinum var teirra stóra gjøgnumbrot.

Hinvegin gjørdist talan enn eina ferð um eitt fantastiskt ár hjá KÍ-kvinnunum, ið óivað eisini síggja ljóst upp á framtíðina, tí bæði gentur 14-17 og smágentur eru eisini meistarar í ár, so har sær nógv gott út til at vera í væntu.

Hjartaliga tillukku við væl uppiborna meistaraheitinum, KÍ!

# Vit kunnu vera errin

Hóast AB-venjarin, Lennard Petersen, var vónbrotin beint eftir tapið fyri KÍ í gjárkvøldið, so dugdi hann væl at síggja, at hetta hevur verið eitt framúr gott ár hjá AB-kvinnunum.




– Nú tekur tað nokk eitt sindur av tíð at koma fyri seg eftir hetta, men eg haldi, at vit kunnu vera errin av hesum árinum. Hóast vit ikki komu á mál í meistarakappingini, so hava vit vunnið steypakappingina, segði hann beint eftir dystin á Argjum.

– Og eg vóni, at vit kunnu vera við har frammi næsta ár eisini. Vit hava fleiri ungar og evnaríkar spælarar, so vit skulu nokk bjóða á aftur.

Tá so tosið kom inn á sjálvan dystin, sum ongantíð gjørdist tað, sum tey í AB høvdu vónað, var venjarin sjálvkritiskur og til reiðar at taka sín part av ábyrgdini fyri, at tað ikki hesa ferð eydnaðist at geva KÍ somu mótstøðu sum í øðrum dystum í ár.

– Eg má nokk taka á mín kappa, at vit bara spældu við einum framherja, tí vit áttu kanska at havt roynt okkurt annað og lagt meira trýst á. Hetta var jú ein dystur, vit skuldu vinna, so tað kundi verið gjørt øðrvísi, staðfesti Lennard Petersen.

**hil**

## FAKTA

**AB-KÍ 0-4 (0-3)**
**0-1:** Ása K. Thomsen, 19.
**0-2:** Ása K. Thomsen, 27.
**0-3:** Rannvá Andreasen, 41.
**0-4:** Ása K. Thomsen, 53.
**Dómari:** Jóan Petur Michelsen
**Hjálpardómarar:** Bent Tommy Linklett & Ríkin N. Djurhuus
**AB:** Simona Heinesen – Rudi Rasmussen, Asta Magnussen, Hellen Haraldsen, Rakul Jógvansdóttir (Ásleyg Súnadóttir, 40.) – Bjørg Syderbø, Olga Kristina Hansen, Steintóra Joensen, Elin Katrina Thomsen (Elin Holm, 79.), Lisa í Liða (Rannvá Jarnskor, 59.) – Mona Breckmann
**Gult kort:** Hellen Haraldsen
**KÍ:** Randi Wardum – Sigrid Jacobsen, Paula Mikkelsen (Mariann Maslyk, 56.), Ragna Patawary, Rannvá Andreasen – Malena Josephsen, Elsa Maria Simonsen, Tove Sólheyg – Ása K. Thomsen, Sofía Purkhús (Una Joensen, 87.), Vivian Bjartalíð (Jenny Lydersen, 75.)
**Gult kort:** Ása K. Thomsen

**1. deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 16 | - | 2 | - | 1 | 94 | 7 | 87 | 50 |
| 2 | AB | 19 | 14 | - | 3 | - | 2 | 50 | 11 | 39 | 45 |
| 3 | Víkingur | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 38 | 23 | 15 | 34 |
| 4 | Skála | 19 | 7 | - | 1 | - | 11 | 24 | 46 | -22 | 22 |
| 5 | EB/Streymur | 19 | 2 | - | 2 | - | 15 | 9 | 67 | -58 | 8 |
| 6 | B68/NSÍ | 19 | 1 | - | 2 | - | 16 | 8 | 69 | -61 | 5 |